# PUBLIC SERVICE FRÁGREIÐING

# 2018

KRINGVARP FØROYA



# INNIHALD


Formæli . . . 3
Framleiðsluyvirlit . . . 4
Álit . . . 6
Aktuelt . . . 8
Kringvarpið sendir nú í HD . . . 11
Kringvarp Føroya á JobMatch 2018 . . . 11
Mentan og Samfelag . . . 12
    Mentan í útvarpinum . . . 12
    Mentan í sjónvarpinum . . . 15
Ítróttur . . . 18
SavnsGull . . . 19
Átrúnaður . . . 20
Barnaøkið . . . 22
    Barnaútvarpið . . . 22
    Barnasjónvarpið . . . 23
Röddin . . . 24
Samskifti við borgaran . . . 25
Tónleikur . . . 26
Skyldur hjá KVF . . . 28



Forsíðumynd: Høgni Heinesen, Heinesen Myndir

Myndir: Egnar myndir, Shutterstock, Landsverk og Fotostudio/Finnur Justinussen.

# KVF — álitið hjá Føroya fólki

Álitið á KVF vaks aftur í 2018 . Tølini frá november vístu, at talið av teimum, sum høvdu lítið álit á KVF sum tíðindamiðil, fór úr 23 % niður á 15,4 % sum árið leið.

Álit byggir á fleiri viðurskifti. Tað er ongin loyna, at partar av 2017 og stórur partur av 2018 vóru sera baldrut fyri KVF. Innanhýsis stríð millum partar av leiðsluni, sum munnaði út í eitt hart og drúgt alment kegl, versnaði um umdømið hjá KVF millum føroyingar. Spenta støðan førdi til útskiftingar í leiðsluni. Johnny í Grótinum gavst sum kringvarpsstjóri, og Kári Sólstein var eitt skifti virkandi stjóri. Eisini tók Heini Gaard við sum virkandi tíðindaleiðari eftir Liljuna Weihe.

Starvsfólkini framleiddu alla tíðina góðar sendingar á ymsu pallum okkara. Slíkt er við til at byggja álitið upp. Dokumentarrøðin “Guð signi Føroyar” gav eitt forvitnisligt innlit í trúarlív í Føroyum og fekk føroyingar at kjakast um átrúnað, lívsáskoðan og tað tvíbýtið, sum kom til sjóndar millum høvuðsstaðarøkið og aðrar partar av landinum. Tíðindadeildin gjørdi dokumentarin “Undir laksin”, sum varpaði ljós á langtíðaravleiðingar av alivirksemi á føroysku náttúruna.

Størsta framleiðslan á barnaøkinum í 2018 var jólakalendarin “Flytifuglar”. Útvarpsleikurin setti viðkomandi spurningar um eittnú samleika og integratión. KVF hevði eitt gott samstarv við Nám um verkætlanina, og næmingar á miðdeildini fingu dygdargott tilfar at arbeiða við í ymiskum lærugreinum.

Mentamálaráðið kunngjørdi við ársbyrjan 2018, at hetta skuldi vera árið fyri málmenning fyri børn. Hetta setti sín dám á fleiri av kringvarpssendingunum fyri hendan aldursbólkin, eittnú sjónvarpsrøðina “Vinus og Vimús”, sum er ætlað teimum yngstu føroyingunum. Her helt KVF fram leiðina seinastu árini – at hugsa málmenning – serliga tí talgildu miðlarnir við útlendskum tilfari í alsamt størri mun mynda dagsskránna í barnauppalingini. KVF hevur ætlanir um at menna enn fleiri átøk á hesum økinum.

Útlendskir miðlar hava eisini sýnt áhuga fyri føroysku barnasendingunum. Íslendska RUV og finska YLE ynskja at vísa “Suma”, sum er sjónvarpsdokumentarrøð fyri størri børn.

2018 var eisini eitt ríkt og spennandi tónleikaár, og fyri fyrstu ferð kunnu vit nú siga, at helvtin av spælda tónleikinum í útvarpinum var føroyskur.

**NÝGGJAR AVBJÓÐINGAR OG TØKNILIG MENNING**

Yvirskipað hevur tað alstóran týdning, at fólk hava álit á KVF. Junk news er helst størsta hóttanin móti journalistikkinum um okkara leiðir í dag. Eyðkenni fyri junk news-miðlar eru m.a., at tað ikki er opinleiki um, hvussu eigaraviðurskifti ávirka innihaldið, at tað ikki altíð verður próvført við støði í røttu fortreytunum, og at fjølmiðaetiskar reglur ikki altíð verða fylgdar. Talan er oftast um netmiðlar, sum ókritiskt varpa søgur ella sjónarmið, sum hava eina aðra dagsskrá enn ta journalistisku. Tí er tað so umráðandi við einum sterkum public service-miðli, sum framleiðir tilfar, ið ger okkum før fyri at virka í dagsins samfelagi á einum upplýstum grundarlagi.

KVF kann nú aftur miðsavna alla sína orku um at framleiða gott tilfar og líta frameftir móti nýggjum avbjóðingum. Vit senda nú í hágóðskuvideo, og framda uppstiganin av OB11 gevur nýggjar møguleikar fyri eittnú stórum ítrótta- og mentanarframleiðslum. Næsta stig verður ein uppstigan av tí stóra Studio 1, sum fer at geva føroyingum fleiri og fjølbroyttari sjónvarpssendingar. Nýggja Studio 4 fer at geva fleiri og fjølbroyttari útvarpssendingar. Hetta gevur eisini KVF orku til at menna útvarpsdokumentarar.

Sendingin “Pressan”, sum viðger tíðindini í vikuni og týðandi rák í journalistikki, varð boðin út til framleiðslu uttan fyri KVF í 2018. Sendingin hevur fingið góða móttøku og hevur nøktandi lurtaratøl. KVF fer í størri mun at bjóða framleiðslur út og keypa lidnar framleiðslur og konsept. Her er talan um eittnú barna- og ungdómssendingar og sjónvarpsdokumentarar.

Málið er enn sum fyrr at koma kring landið og kennast viðkomandi fyri allar føroyingar. Hesa meginuppgávuna fara vit at styrkja framyvir. Somuleiðis vilja vit framhaldandi menna tann kritiska og óhefta journalistikkin, sum er ein so týðandi partur undir føroyska fólkaræðinum.

Verandi public service-sáttmáli gongur út við árslok 2020. Tí kunnu vit vænta, at orðaskifti um nýggja public service-sáttmálan fer at taka seg upp seinni í ár. Tað orðaskiftið gleða vit okkum til.
Við ynskjum um eitt gott ár fyri KVF og brúkarar tess.

**Ivan Hentze Niclasen, kringvarpsstjóri**

# Framleiðslur í tímum

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 548 | 85 | 633 |
| Tónleikasendingar | 4546 | 27 | 4573 |
| Infotainment | 1199 | 41 | 1240 |
| Børn/ung | 102 | 139 | 241 |
| Átrúnaður | 303 | 72 | 375 |
| Mentan | 1213 | 106 | 1319 |
| Ítróttur | 164 | 232 | 396 |
| **Samanlagt** | **8075** | **702** | **8777** |

**BÓLKARNIR FEVNA UM HESAR SENDINGAR:**

**Aktuelt:** Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, Radarin og D&V-kjak.

**Tónleikasendingar:** Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

**Infotainment:** Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði "information" og "entertainment". Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Morgunsendingin, GMF, sendingin Vikuskiftið, Nú er leygardagur, Ólavsøkuprát, Gekkurin, Summargestir o.tl.

**Børn og ung:** Barnaútvarpið og allar barnasendingar í sjónvarpi, bæði føroyskar og týddar.

**Átrúnaður:** Morgunlestrar, andaktir, guðstænastur, møti og sendingin Credo.

**Mentan:** Mentanarsendingar, Nón, siðsøga (t.d. Meg Minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórði á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar hóskvøld, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

**Ítróttur:** Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskiftunum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

**Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingina:** Tingvarpið í sjónvarpinum.


2%
7%
15%
4%
1%
15%
56%
Útvarp
Aktuelt
Tónleikasendingar
Infotainment
Børn og ung
Átrúnaður
Mentan
Ítróttur


12%
4%
33%
6%
20%
15%
10%
Sjónvarp
Aktuelt
Tónleikasendingar
Infotainment
Børn og ung
Átrúnaður
Mentan
Ítróttur

# Álitisbarometrið

Síðan februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað, hvussu tað stendur til við áliti føroyinga til Kringvarp Føroya og aðrar føroyskar miðlar. Álit er ein av fortreytunum fyri tilverurættinum hjá Kringvarpi Føroya, og er hetta nakað, sum stovnurin arbeiðir miðvíst við at varðveita og betra.

400 fólk í aldursbólkunum 18-29, 30-44, 45-59 og 60-80 ár í øllum landinum verða sostatt regluliga biðin um at meta um, hvussu stórt álit tey hava á føroyskum tíðindamiðlum sum heild og á Kringvarpi Føroya. Tílíkar spurnarkanningar skulu altíð takast við ávísum fyrivarni, tó kunnu afturvendandi spurnarkanningar sum hesar geva nakrar góðar ábendingar.

### Hvussu stórt álit hevur tú á hesum miðlum?



Álitsbarometrið gongur frá 1 upp til 7, sum er fult álit. Álitið er kannað 11 ferðir, og í seinastu kanningini í november 2018 vísti barometrið hægstu meting nakrantíð á 4,6. Heildarmyndin vísir, at álitisbarometrið er hækkað støðugt, síðan Spyr.fo byrjaði at gera hesa kanning fyri Kringvarpið. Talvan niðanfyri vísir samlaða álitið á føroyskar miðlar í mun til álitið á Kringvarpi Føroya.

## Álit á føroyskar tíðindamiðlar samanborið við álit á KVF




## Álit á KVF sum tíðindamiðil






# Eitt tíðindaríkt ár bæði so og so

*Aktuelt er landsins størsta tíðindaredaksjón. 22 fólk starvast í løtuni á deildini, býtt í eina sjálvstøðuga útvarpsredaksjón, eina sjónvarpsredaksjón og í fleiri smærri redaksjónir, sum hvønn gerandisdag framleiða tíðindi til aðrar sendingar, ítróttarsendingar og tíðindi á heimasíðuna hjá Kringvarpinum. Umframt føstu regluligu tíðindasendingarnar ger deildin eisini perspektiverandi tíðindasendingina "Radarin".*

Í juni 2018 varð ítróttarredaksjónin hjá Kringvarpi Føroya flutt til Aktuelt-deildina. Ítróttarredaksjónin ger eina vikuliga ítróttar-sjónvarpssending mánakvøld kl. 19.20 og ítróttartíðindi til Dag & viku hóskvøld. Kappróður verður sendur beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi, og í útvarpssendingini "Bólturin" sunnudagar er beinleiðis frásøgn frá bestu mansdeildini í fótbólti.

**STAKSENDINGAR**
Aktuelt ger hvørt ár eina røð av ymiskum staksendingum og eykasendingum. Talan kann vera um eyka tíðindasending, tí politisk kreppa tekur seg upp, ella um drúgvar framleiðslur.

**POLITISKUR KJAKFUNDUR Á SJÓMANNADØGUM**
Á sjómannadøgunum varð skipað fyri almennum kjakfundi um fiskivinnunýskipanina við floksformonnunum. Kjakfundurin varð sendur beinleiðis í útvarpinum.









**GLASIR**
Sent varð beinleiðis á heimasíðu Kringvarpsins frá hátíðarhaldinum, tá ið Landsverk handaði Føroya Landsstýri bygningin.

**KRÚNPRINSAVITJAN**
Krúnprinsahjúnini vóru á vitjan í august mánaði. Í tí sambandi vóru fleiri smærri staksendingar framleiddar og sendar, umframt ein beinleiðis studiosending við gestum, har eisini varð sent beinleiðis frá galladøgurðanum í Norðurlandahúsinum.

**UNDIR LAKSIN**
Aktuelt hevur eins og undanfarin ár framleitt fleiri staksendingar í 2018. Á heysti 2018 varð dokumentarsendingin "Undir laksin" send. Sendingin viðgjørdi, hvørji umhvørvisárin alivinnan í Føroyum hevur í firðunum. Sendingin elvdi til alment orðaskifti um leiklutin hjá vinnuni og dálkingina í firðunum, sum ikki sæst við berum eyga.

**EYKA TÍÐINDASENDINGAR**
Tíðindi bíða ikki eftir tíðindafólki ella tíðindasendingum, og tí er neyðugt at sleppa øllum, rudda skránna og seta eyka tíðindasendingar á skrá. Kringvarp Føroya er partur av tilbúgving Føroya, og tað merkir, at tá ið ódnarveður er, er tað uppgávan hjá Aktuelt at bera reglulig tíðindi um koyrilíkindi, kavarudding, avlýsingar o.a., sum er viðkomandi fyri fólk at vita, áðrenn tey fara frá húsum. Stundum er politiskt ódnarveður, og tá verða eisini eyka tíðindasendingar settar á skránna.

Kringvarp Føroya sendi eyka tíðindasendingar í útvarpinum og dagføringar á heimasíðuni, tá ið andstøðuflokkarnir løgdu fram misálit á Rigmor Dam, táverandi landsstýriskvinnu við mentamálum. Orðaskiftið vardi til seint á náttina, og Aktuelt gjørdi eyka tíðindasendingar hvønn tíma alla náttina.

**TÍÐINDI Á ENSKUM**
Public service-sáttmálin tilskilar, at Kringvarpið skal framleiða PS-tilfar málrættað til tilflytarar, sum ikki duga føroyskt ella skandinaviskt mál. Í 2018 varð tískil tikið stig til at gera føroysk tíðindi á enskum til tey mongu, sum búgva í Føroyum, men ikki duga málið nóg væl til at kunna fylgja við í og vera ein aktivur partur av samfelagnum. Tíðindi á enskum vórðu ment í samráð við Útlendingastovuna.

Mett var, at besti hátturin at røkka útlendingum í Føroyum var á netinum, og tískil eru tíðindi á enskum at finna á heimasíðuni hjá Kringvarpinum, kvf.fo. Tíðindi á enskum eru somu tíðindi, sum verða gjørd á føroyskum og sostatt verða týdd til enskt. Uppgávan at týða greinar til enskt varð boðin út, og avtala varð gjørd við fyritøkuna Prosa um at týða greinar til enskt.

**PRESSAN**
Ein nýggj sending varð sett á skránna í 2018. Pressan er sending, ið skal viðgera tíðindini í vikuni og týðandi rák í journalistikki. Verturin á sendingini skal leiða lurtaran gjøgnum tíðindameldurin og avdúka vánaligan journalistikk, spuna, falstíðindi og marknaðarføring dulklødd sum tíðindi. Ásannandi at Aktuelt-deildin framleiðir ein rættiliga stóran part av øllum tíðindunum í Føroyum, ið javnan verða viðgjørd í sendingini, varð gjørt av at bjóða sendingina út, so verturin var óheftur av Aktuelt-deildini. Tvær umsóknir komu inn, og tikið varð av tilboðnum frá Øssuri Winthereig.

Sendingin er í 2019 flutt fyrisitingarliga til aðra deild í Kringvarpinum við somu grundgeving – at gera sendingina so óhefta av Aktuelt-deildini sum til ber.

Ein lurtarakanning, sum Spyr.fo gjørdi fyri Kringvarpið, vísti nøktandi lurtaratøl og lurtaranøgdsemi við sendingina.












# Kringvarpið sendir nú í HD

Í november 2018 varð umleggingin frá SD til HD liðug, og signalið úr Sortudíki hevur tí síðan tá verið í HD. Televarpið gav Kringvarpinum rúm á sínum luftborna neti tann 19. mars 2019, vónandi til gleði fyri allar okkara mongu hyggjarar.

HD-umleggingin merkir, at allar sendingar hjá KVF nú verða sendar í HD, og at hyggjarin ikki fer at kenna mun á myndunum hjá KVF og øðrum sjónvarpsrásum. Hetta er eitt stórt framstig fyri okkum! Savnsmyndir og eldri sendingar eru sjálvsagt ikki í HD.

Kringvarpið hevur brúkt nógvar pengar og arbeiðsorku uppá at dagføra sendirúm og alla aðra útgerð frá SD til HD.




# Kringvarp Føroya á JobMatch 2018

Kringvarpið var fyri fyrstu ferð við á tiltakinum JobMatch í desember 2018. Vit høvdu ein bás í Skálanum, har kringvarpsstjórin, Ivan H. Niclasen, og onnur starvsfólk vóru stødd allan dagin.

Endamálið hjá KVF við at luttaka var at skapa samband við bæði føroysk og útlendsk lesandi, nýútbúgvin og útbúgvin við starvsroyndum um møguligt samstarv – tað veri seg um uppgávur í sambandi við lesnaðin, starvsvenjing, fríyrkisuppgávur ella annað.

Tiltakið var væleydnað, og fleiri ung fólk komu í básin hjá KVF, har millum annað eitt samstarv um starvsvenjing kom í lag.



# Mentan í útvarpinum

Útvarpið hevur hvørja viku havt eina rúgvismikla skrá við tilfari, ið lýsir og viðkemur føroyska samfelagnum. Kringvarpið hevur verið víða um í landinum og lýst tættir hjá føroyska borgaranum frá øllum hugsandi heraðshornum. Skráin byrjar kl. 07.00 hvønn morgun og heldur fram til langt út á kvøldið. Skráin hevur verið uppbygd í stórar flatar: Góðan Morgun Føroyar um morgunin, Nón seinnapartin og Leygardagur leygardag. Umframt hetta eru framleiddar ein rúgva av staksendingum og sendingum, sum eru fast á skrá hvørja viku.

**GÓÐAN MORGUN FØROYAR**

Góðan Morgun Føroyar hevur lagt seg eftir at senda upplýsandi og undirhaldandi útvarp (infotainment) hvønn gerandismorgun kl. 7.35-9.50.

Hvørja viku í 2018 vóru serfrøðingar í útvarpsstovuni og greiddu frá einum evni, teir hava servitan um. Harafturat høvdu lurtarar møguleika at senda inn spurningar, sum serfrøðingurin svaraði. Í 2018 vóru serfrøðingar so sum djóralækni, løgfrøðingur, fíggjarráðgevi, lækni, heilsufrøðingur og gartnari fastur partur av morgunsendingini.

Eisini var málteigurin við Elini Henriksen fastur táttur í morgunsendingini í 2018. Málkøna kvinnan umrøddi orð og málburð, og ymiskt annað í sambandi við føroyska málið, sum var aktuelt júst tá. Harafturat fingu lurtarar møguleika at seta Elini spurningar.

Morgunsendingin hevði í fleiri umførum kappingar av ymsum slagi. Av teimum stóru kunnu nevnast Ársins granni, Ársins starvsfelagi og Ársins orð. Rættiliga nógv varð gjørt burtur úr hesum innsløgunum, sum hvør sær gingu fyri seg í umleið eina viku, har lurtarar kundu senda inn uppskot, og síðan varð vinnarin kosin. Eittnú varð stroymt beinleiðis á Facebook-síðuni hjá GMF, meðan Ársins granni varð tikin á bóli og fekk handað stóra gávukurv.

Morgunsendingin leggur seg eftir at gera útvarp til allar føroyingar, og tí vóru innsløgini í 2018 úr øllum landinum. Nakrar ferðir fór øll ella partur av redaktiónini til aðrar býir og bygdir í Føroyum, haðani sent varð frá beinleiðis.

**100 FERÐIR NÓN**

Nón er seinnapartssendingin í útvarpinum, sum verður send týsdag, mikudag og hósdag kl. 15-17. Nón er magasin-sending, og karmurin um sendingina er mentan og samfelag í breiðum týdningi. Málið er at geva lurtaranum upplýsing, uppliving og undirhald gjøgnum beinleiðis útvarp, kryddað við reportasjum, frásagnum og kjaki, har stundir eru til longri samrøður, viðgerðir og greiningar.

Týsdagurin er settur av til temasendingar, mikudagurin er settur av til mentan, og hósdagurin er oftast í aktuella horninum.

Slakar 100 Nón-sendingar vóru í 2018, og tilsamans vóru 33 Tematýsdagar gjørdir. Millum evnini, ið vórðu viðgjørd í Tematýsdøgunum, vóru:

- Mál og málmenning
- Tað góða lívið
- Flemish Cap
- Handverkarayrkið
- Føroysk matmentan
- Útjaðari og miðstaður
- Ísrael 70 ár
- 1990-árini í Føroyum
- Tað meiningsfulla arbeiðið
- Útjaðari og miðstaður
- Tilflyting, ymiskleiki og margfeldi
- O.m.a.

Nón hevur havt samrøður og frásagnir úr øllum Føroyum, og í 2018 vórðu heilar sendingar sendar beinleiðis av Tvøroyri, úr Miðvági, av Sandi, úr Vestmanna, Fuglafirði og Leirvík.




**176 FERÐIR VIÐ TÓRÐI Á TÚRI**

Í 2018 var Tórður Mikkelsen 29 túrar afturat í røðini “Við Tórði á túri”, sum verður send í útvarpinum mánadagar kl. 17.05. Sostatt hevði hann 1. januar í ár verið tilsamans 176 túrar, síðan hann var tann fyrsta av hesum slagnum í Funningsfirði 2. september 2013.

Í 2018 var túrur m.a. í Skarðsvík í Fugloy, í Tindhólmi eftir veðrum, niðri í Eysturoyartunnlinum og til forkunnuga bókaframløgu í Mykinesi.

Annars vitjaði Tórður í bygdum sum Rituvík, Leynum, Syðradali í Streymoynni, Norðragøtu, Hvalvík og í avtoftaðu bygdini Akrabergi, ið er sunnasta búpláss í landinum. Av býlingum, sum í fjør høvdu forvitnu mikrofonina á vitjan, kunnu m.a. nevnast Kósin í Klaksvík, norðuri í Sundum í Kollafirði og Tórsbyrgi í Havn.

Ein av sendingunum var úr Wales, har verturin ferðaðist saman við familjuni. Hóast Wales er eitt av okkara nærmastu grannalondum, vita vit føroyingar lítið og einki um hetta spennandi landið.

Í sendingini "Við Tórði á túri" verður varpað ljós á gerandisdagin hjá fólki kring landið. Forvitni er drívmegin, og evni, ið ikki skapa yvirskriftir í miðlunum, hava mangan stóran týdning fyri fólkið á staðnum.



**PLÁTUBARRIN 2018**
Sendingin í 2018 var eftir sama leisti sum í 2017, tað vil siga ein undirhaldssending leygarkvøld við tónleiki frá kl. 20.00 til kl. 02.00 sunnunátt. Talan er um eina vetrarsending, sum í 2018 fór í summarfrí 5. mai og byrjaði aftur 20. oktober. Sent varð eisini um høgtíðirnar.

Stabbarnir í Plátubarrini eru tveir tematættir, annar tíðliga á kvøldinum og hin um midnáttarleitið. Tann fyrri, Temaplátan, er ein gjøll gjøgnumgongd í 45-55 minuttir av einari útgávu. Onkuntíð, tá talan er um føroysk verk, verður sendingin gjørd í samrøðuformi. Seinni tátturin er 10-15 minuttir styttri enn Temaplátan og ein meira samansett søga í teksti og tónleiki, ið altíð hevur ein reyðan tráð av onkrum slag. Báðir tættirnir verða bandaðir, og Temaplátan verður endursend mikudag.

Annað fyrireikað tilfar er Vertsins Løta kl. 20.00, har verturin sigur søgur og spælir tónleik, tó fyrstu umleið 10 minuttirnir eru ein frágreiðing og perspektivering av heldur filosofiskum slagi; ein eygleiðing av okkara atferð, sum verturin hugleiðir um. Allar aðrar tíðir á kvøldinum verða lurtaraynski send.

**MINIBARRIN 2018**
Minibarrin taldi 50 sendingar í summarskrá Kringvarpsins. Tær vórðu sendar gerandisdagar frá 2. juli til 7. september frá klokkan 15.05 til 16.00. Tá eru einans upprunasenditíðirnar nevndar. Endursendingar vóru eisini.

Ymiskt frá degi til dags innihelt Minibarrin burturav tónleik og søgur um tónleik. Summar dagar var tilfarið rættiliga blandað, meðan aðrar sendingar vóru meira tematiskar. Av tí at atlit varð tikið til ein fjølbroyttan lurtaraskara, kundi ein í somu viku hoyra nógv ymisk tónleikasløg. Nakrar sendidagar varð farið í dýpdina við poppsøguni.

Talan var um sendingar við atliti til summartíðina, ið vórðu bandaðar í mars og apríl. Tí vóru tær ikki ávirkaðar av aktuellum hendingum, dagshýrinum ella veðrinum tann einstaka dagin, men lógu við frávikum í fastari legu.

**SUMMARTÍMIN**
Tað hevur verið siðvenja í nógv ár í útvarpinum at hava eina lættari summarsending, sum sendir beinleiðis seinnapartar, frá juli og inn í september. Leisturin hevur verið ymiskur og heitini mong. Í 2018 varð avgjørt at gera tað einfalt og seta tvey fólk av at gera ein tíma av útvarpi.

Í summar var Finnur Koba vertur og Rebekka Manuela Behrens reportari í sendingini, sum varð rópt Summartímin.

Tey løgdu seg eftir at viðgera millum trý og fýra evni hvønn dag. Verturin fekk ofta vitjan av onkrum aktuellum gesti, meðan reportarin boðaði frá úti um landið. Ofta sendu tey eisini bandaðar samrøður við fólki ella frá tiltøkunum frá kvøldinum fyri.

Tær flestu sendingarnar vórðu sendar úr studio 5 í Sortudíki í Havn, men eina ferð um vikuna fóru tey út um bøgarðarnar og settu eitt mobilt ministudio upp. Eittnú varð sent úr kaféini á Sandi, úr Salt á Drelnesi, frá kunningarstovuni í Nólsoy, frá gamla handlinum í Syðrugøtu og frá posthúsinum í Klaksvík.

Summartímin varð sendur 47 ferðir í fjør summar. Ætlanin er at endurtaka leistin í 2019.

**LEYGARDAGSSENDINGIN**
Henda sending er ein beinleiðis útvarpssending, sum er til familjuna Føroyar. Útvarp at vakna til, at eta morgunmat til, og at hava sum ljóðtapet til vikuskiftispják fyrra partin av degnum.

Vit hava tikið upp evni innan frítíð og ítriv, og vit hava ferðast til tiltøk kring landið, sum hóskaðu seg at senda beinleiðis frá.

Tónleikur er týdningarmikil partur av sendingini, og dentur hevur verið lagdur á at spæla tónleik til bæði ung, vaksin og eldri. Sendingin hevur verið á skrá frá kl. 10.00 til kl. 14.00 hvønn leygardag.




**ALSO**
Also er ein beinleiðis útvarpssending við einum útvaldum paneli, ið viðger spurningar og brøv, sum lurtarar hava sent til sendingina. Luttakararnir í panelinum eru skiftandi, og tey búgva ella hava røtur ymsastaðni í landinum og koma frá ymsum samfelagsbólkum, útbúgvingarstøði og fakbólkum.

SMS-skipanin hjá Kringvarpinum og Facebook-síðan hjá sendingini verða nógv nýtt fyri at fáa lurtaran við, og hetta hevur eydnast sera væl.

**TRIMPIL**
Sending í fleiri pørtum har verturin saman við fólkalívsfrøðinginum Jóan Paula Joensen gjøgnumganga ymiskar søguligar tekstir við fólkafrøðisligum brillum. Tosað verður um Messlinga-ritgerðina hjá Panum frá 1847, um røðu, sum ein ungur studentur, A. Jógvansson, helt í føroyinga-felagnum í Keypmannahavn í ár 1900, og um bókina Føroysk Hús, sum Hans W. Tórgarð gav út í 1932.

**FÓTBÓLTSPRÁT**
Ein sending, har skift verður orð um føroyskan fótbólt. Fótbóltsserfrøðingar og venjarar gera viðmerkingar til teir dystir, ið hava verið leiktir í vikuni og um vikuskiftini. Sendingin er á skrá hvønn mánadag kl. 13.00, og Tróndur Vatnhamar er vertur.




**YMISKAR STUTTRØÐIR OG STAKAR SENDINGAR FRAMLEIDDAR OG SENDAR Í 2018**
**Út við BBC – inn við MTV** – Tvær sendingar um tá ið ungdómurin í Havn gjørdi uppreistur um, at MTV varð tikið av Rás Tórshavn. Finnur Koba legði til rættis.

**Mín avrikslisti** – Tríggjar sendingar, har ymisk fólk greiða frá teirra avrikum. Sissal Kampmann legði til rættis.

**Grundtvík, Gasolin og grundfesti gøtusangarin** – Sending um kenda tónleikaran Kim Larsen, ið andaðist í 2018. Dagfinn og Theodor Olsen løgdu til rættis.

**Hann helt, at alt bar til** – Minnissending um undangongumannin Ólav Hátún, ið andaðist í 2018. Tórður Mikkelsen legði til rættis.

**Saman um alt – Tá lív og virki renna saman** – Tríggjar sendingar um pør, sum umframt at liva saman, eisini arbeiða saman. Sissal Kampmann legði til rættis.

**Útsýni** – Sending í fimm pørtum við ymiskum áhugaverdum vísindasøgum. Kári Sólstein legði til rættis.

**Í føðingardag hjá Madonnu** – Sending um tónleikastjørnuna Madonnu, ið fylti 60 ár í 2018. Guðrið Hansdóttir og Heiðrikur á Heygum løgdu til rættis.

**Treystir hálvfemsarar** – Sending um teir tríggjar Pál Joensen, Helga Dam Ziska og Poul Andrias Ziska, ið allir hava verið við til at flutt mørk í føroyskum høpi, og so eru teir allir føddir í 1990. Uni Holm Johannesen legði til rættis.

**Alt av tilvild** – Sending um listakvinnuna Astrid Andreasen, ið fylti 70 í 2018. Sissal Kampmann legði til rættis.

**Flogvanlukkan í Selvík** – Sending í tveimum pørtum um størstu vanlukkuna í nýggjari danskari verjusøgu. Elin Mirjamsdóttir legði til rættis.

**Latum okkum bløða** – Ein sending um mensuna, ella rættari menstruatiónina, hjá kvinnum. Sissal Kampman legði til rættis.

**Guðs gólv** – Ein sending um eitt lag, Guðs gólv, ið var gjørt til sjónleikin "Tornið við Heimsins enda". Sissal Kampmann legði til rættis.

**Hjálpirøturnar í bláa húsinum** – Ein sending um ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark. Sissal Kampmann legði til rættis.

**Ein tími í parykki** – Á kaffisalong við Dennis Agerblad. Sissal Kampmann legði til rættis.








# Mentan í sjónvarpinum

**LYST**
Í januar varð mentanarsendingin Lyst sett á skrá hvørt fríggjakvøld í sjónvarpinum.

15 sendingar fyrra hálvár og 8 sendingar á heysti varpaðu ljós á listina í Føroyum í breiðari merking.

Hvør sending var millum 15 og 20 minuttir og býtt í trý innsløg. Leisturin var rættiliga greiður:

Fyrsta innslag viðgjørdi okkurt evni, eittnú kitsch-list, talufrælsi í skaldskapi, minkandi fløgusølu, og ógegni í almennum listanevndum.




Næsta innslag var portrett av einum aktuellum listafólki. Nevnast kunnu t.d. Sigrun Gunnarsdóttir, Óli P., Pipar & Salt, Frits Johannesen, Teitur Lassen, Anna Malan Jógvansdóttir, Øssur Johannesen og Heiðrikur á Heygum

Triðja innslag var ein reportasja á onkrum listarligum staði, t.d. Krígssavnið í Miðvági, Bátasavnið í Leirvík, Listasavnið á Sandi, Tjóðsavnið í Hoyvík og Banknordik-savnið í Hoyvík.

Finnur Koba og Hallur Thomsen gjørdu sendingarnar.

**FØROYSKAR SJÓNVARPSSENDINGAR**
Hvørja viku í vetrarskránni sendir KVF føroyskar sjónvarpssendingar. Talan er í høvuðsheitum um dokumentarar, portrett og heimildarsendingar. Sendingarnar varpa ljós á eina rúgvu av tættum í tí føroyska samfelagnum og kunna hyggjaran um viðurskifti, sum hava breiðan, samfelagsligan áhuga.

## SJÓNVARPSSENDINGAR FRAMLEIDDAR Í 2018

**Rekamaðurin á Hellunum** – Sending um Justinus Eidesgaard, sum saman við konuni og familjuni gera eina dreym til veruleika: at gera eini hús úr rekaviði á Hellunum. **Lagt til rættis:** Tórður Mikkelsen og Jógvan Eli Dam.

**Kendir føroyingar: Andrea Árting** – Sending um Andreu Árting, sum í ringastu 30unum púra óvæntað gjørdist forkvinna í Havnar Arbeiðsmannafelag og nógv ár seinni rakk málinum, at menn og kvinnur skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. **Lagt til rættis:** Ivan Hentze Niclasen.

**Archibald Black** – Sending um listamannin, tónleikaran, bóndan og undangongumannin at byggja upp garðin hjá Nólsoyar Páll av nýggjum. **Lagt til rættis:** Kári Sólstein.

**Mentanarvirðisløn landsins** – Sent varð beinleiðis, tá ið mentanarvirðislønir landsins vóru handaðar. Í hesum sambandi var sendingin **Ein dagur í Lívinum**, har fylgt varð við dagliga lívinum hjá Barbaru í Gongini, ið fekk mentanarvirðisløn landsins, og sendingina **Litir og ljómir**, ið er eitt portrett av listamanninum Frits Johannesen, ið fekk heiðursgávu landsins.

**Kendir føroyingar: Thorstein Petersen** – Sending um floksformannin, løgtingsmannin, fólkatingslimin, bankastjóran, sakføraran, vinnulívsmannin o.a., Thorstein Petersen. **Lagt til rættis:** Suni Merkistein.

**Ein skuggi av mær sjálvum (1:2)** – Sending um 29 ára gamla Eyðun Ásason, ið fekk staðfest Parkinson sum bert 29 ára gamal. **Lagt til rættis:** Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup Hansen.

**Eitt meira virðiligt lív (2:2)** – Um Eyðun Ásason, ið fær elektrodur førdar inn í heilan, sum kunnu geva honum førleikarnar aftur, ið Parkinson hevur tikið frá honum. **Lagt til rættis:** Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup Hansen.

**Gud signi Føroyar** – Sending í seks pørtum um hvat eyðkennir føroyskan kristindóm í okkara samtíð.

Í seks pørtum varpaði sjónvarpsrøðin Gud signi Føroyar ljós á tær stóru kristnu rørslurnar í Føroyum, 500 ár eftir reformatiónina. Kristindómurin hevur mong andlit og finst í alskyns útgávum, og við einum fjølbroyttum úrvali av keldum við ymiskum sjónarmiðum og lívsroyndum viðgjørdi sendirøðin eisini tær ósemjur, sum finnast í føroyskum trúarlívi.

- Endamálið var at kanna tey ymsu andlitini, sum kristindómurin hevur, ella hvussu kristindómurin kemur til sjóndar í ymiskum rørslum. Og ja, tað er eitt viðbrekið evni at viðgera, sigur Heini í Skorini, ið hevur gjørt sendingina saman við myndamanninum Hans Peturi Hansen.

Hann leggur afturat: “Hetta var eitt viðbrekið evni hjá mær og hjá øllum teimum, sum luttaka í sendingunum, tí átrúnaður og lívsáskoðan er nakað, sum nertir við persónligar kenslur. Og tað hevur eisini verið ein avbjóðing. Eg havi upplivað, at vit eru von við at viðgera og kjakast um politikk, men vit eru ikki líka von at kjakast um átrúnað”, sigur Heini í Skorini.

Umframt sjálva sendirøðina Gud signi Føroyar var nógv kjak í Kringvarpinum um átrúnað, lívsáskoðan og tað tvíbýtið, sum tær ymisku kanningarnar í sendingini vístu. **Lagt til rættis:** Heini í Skorini.

**Føroyskir stuttfilmar** – Tvær sendingar, har tilsamans seks stuttfilmar, framleiddir av føroyskum filmsfólkum, vórðu sýndir. Eisini varð tosað um føroyskan film og filmsvinnu í sendingunum. **Lagt til rættis:** Elin Mirjamsdóttir.

**Krígsbørnini** – Sending í tveimum pørtum um tey børn, ið vórðu fødd undir øðrum veraldarbardaga, har pápin var enskur hermaður, ið var farin av landinum, og eftir sat mamman einsamøll eftir við einum barni í Føroyum. **Lagt til rættis:** Ivan Hentze Niclasen.

**Tey serligu børnini** – Sending um at í grannalondum okkara verða næstan ongi børn fødd við Downs syndromi longur, men í Føroyum verður í miðal eitt barn føtt um árið. **Lagt til rættis:** Dagmar Joensen-Næs.

**Sjúklingahotellið** – Sending har vit fylgja starvsfólkunum og sjúklingunum á sjúklingahotellinum í Keypmannahavn. **Lagt til rættis:** Elin Mirjamsdóttir.

**Kendir føroyingar: Sámal Joensen-Mikines** – Sending um kenda myndlistamannin Sámal Joensen-Mikines. **Lagt til rættis:** Ivan Hentze Niclasen.

**Ongin dagur uttan pínu** – Um Winnie og Hans Berg, sum í fleiri ár hava stríðst við kroniskari pínu. **Lagt til rættis:** Dagmar Joensen-Næs.













**Havið – Kærleiki umborð** – Um hjúnini Sonna og Jenny Kalsoy, sum halda lív í útróðrarvinnuni, ið er við at doyggja út í Føroyum. **Lagt til rættis:** Eir í Ólavsstovu.

**Ítróttarportrett – Jóhann á Plógv** – Um hondbóltsspælaran Jóhan á Plógv Hansen, sum spælir við einum av bestu liðunum í donskum hondbólti. **Lagt til rættis:** Tróndur Vatnhamar og Eyðun Muller Thomsen.

**Undir laksin** – Um føroysku alivinnuna, hvat hendir undir vatnskorpuni – um skuggasíður í eini blómandi alivinnu. **Lagt til rættis:** Rógvi Olavson.

**Tað er nú, vit liva** – Sending um Marina og Árna, ið hava ólekjandi krabbameinssjúku, men hava ikki valt at fingið lívsleingjandi kemoviðgerð, tí tey ynskja at hava tað gott saman við sínum kæru. **Lagt til rættis:** Dagmar Joensen-Næs.

**Happing** – Um Rannvá og Rúna, ið hava verið fyri happing í barna- og ungdómsárunum. **Lagt til rættis:** Eir í Ólavsstovu.

**Gud man ráða, hvar vit drekka ...!** – Sending í tveimum pørtum um ta serligu drykkjumentan, ið føroyingar hava havt og hava. **Lagt til rættis:** Suni Merkistein.

**Kendir Føroyingar: Jørgen Frantz** – Sending í tveimum pørtum um kenda rithøvundin Jørgen-Frantz Jacobsen, ið er kendur fyri millum annað bókina Barbara. **Lagt til rættis:** Suni Merkistein.

# Ítróttur

Ítróttarsendingin 3-2 er í sjónvarpinum mánakvøld, og ítróttur er eisini partur av sjónvarpstíðindunum hóskvøld.

Fótbóltssendingin hjá Kringvarpinum, Bólturin, er í útvarpinum sunnudag, og mánadag er fótbóltskjak.

KVF framleiddi/sendi steypafinalurnar í hond,- flog- og fótbólti, FM í svimjing, FM í dart, FM í estetiskum fimleiki, FM í borðtennis, badminton og judo.

KVF sendi seks UEFA Nations League dystir hjá fótbóltslandsliðnum. Sent varð frá øllum sjey FM-kappróðrunum, bæði í útvarpi og beinleiðis stroyming á heimasíðuni.

KVF stroymir nógvan ítrótt. Í 2018 stroymdi KVF frá fótbólti, hondbólti, flogbólti, kurvabólti, kappróðri, dart og boccia.






## STØRRI ÍTRÓTTARFRAMLEIÐSLUR Í SJÓNVARPINUM Í 2018

| | |
|---|---|
| 17.02.2018 | Steypafinalurnar í hondbólti |
| 24.02.2018 | Steypafinalur í flogbólti |
| 21.03.2018 | EM undankappingardystur í hondbólti, Føroyar-Makedonia |
| 07.04.2018 | Stóri FM dagurin í badminton, borðtennis og judo |
| 14.04.2018 | FM í dart |
| 15.04.2018 | FM í boccia |
| 21.05.2018 | FM í estetiskum fimleiki |
| 30.05.2018 | EM undankappingardystur í hondbólti, Føroyar-Serbia |
| 02.06.2018 | FM kappróður í Klaksvík |
| 09.06.2018 | FM kappróður í Kollafirði |
| 16.06.2018 | FM kappróður í Runavík |
| 30.06.2018 | FM kappróður í Vági |
| 07.07.2018 | FM kappróður í Vestmanna |
| 14.07.2018 | FM kappróður í Sandavági |
| 28.07.2018 | FM kappróður í Tórshavn |
| 25.08.2018 | Steypafinalur í fótbólti |
| 04.09.2018 | HM-undankappingardystur í fótbólti kv., Føroyar-Týskland |
| 07.09.2018 | UEFA Nations League, Føroyar-Malta |
| 10.09.2018 | UEFA Nations League, Kosovo-Føroyar |
| 11.10.2018 | UEFA Nations League, Føroyar-Aserbadjan |
| 14.10.2018 | UEFA Nations League, Føroyar-Kosovo |
| 26.10.2018 | FM í svimjing |
| 27.10.2018 | FM í svimjing |
| 27.10.2018 | EM undankappingardystur í hondbólti, Føroyar-Danmark |
| 28.10.2018 | FM í svimjing |
| 17.11.2018 | UEFA Nations League, Aserbadjan-Føroyar |
| 20.11.2018 | UEFA Nations League, Malta-Føroyar |

# Verkætlanin SavnsGull er nú hálvrunnin

Endamálið við verkætlanini er at bjarga tilfarinum í Kringvarpssavninum, av tí at tað eru fá ár eftir at fáa tilfarið av gomlum bondum á talgildar miðlar. Verkætlanin skal eisini arbeiða fyri, at tilfarið verður atkomuligt fyri almenningin.

SavnsGull leggur stóran dent á, at góðskan er so góð, sum til ber. Tí er "góðska" eisini eitt aðalevni í arbeiðinum.

Savnið er býtt sundur í tríggjar partar: pappír, ljóð- og sjónvarpsbond.

Meir enn helvtin av pappírspartinum er talgildað og skrásett. Eftir ætlanini verða ljóð- og sjónvarpsbondini talgildað í 2021, síðan er eftir at skráseta.

Pappírsparturin varð tað fyrsta, sum vit fóru undir at talgilda og skráseta. Pappírsparturin fevnir um tíðindi, veðurtíðindi, kodalistar, skráir o.a., ið er skrivað frá 6. februar 1957 og fram til 1996, tá pappír varð skift út við teldu. KT-deildin í Kringvarpinum hevur ment eitt forrit, har til ber at rætta og skráseta. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um at rætta tey møguligu lyklaorðini, sum eru skeivt stavað – ella annað, sum ger tað torført at eyðmerkja tilfarið – soleiðis, at tað seinni verður møguligt at finna skjølini aftur, tá leitað verður eftir tí einstaka orðinum, setninginum ella navninum v.m. Við teimum dugnaligu fólkunum í SavnsGulli gongur hetta arbeiðið væl.

Fyri 2001 vórðu allar sendingar og alt annað, sum varð upptikið og sent í Útvarpi Føroya, tikið upp á bond, sum eru varðveitt og sett á goymslu. Hetta tilfarið fevnir um sendingar, ið hava verið at hoyrt í útvarpinum frá 6. februar 1957, tá Útvarp Føroya varð sett á stovn. Talgildingin av ljóðbondunum gongur við rúkandi ferð, og av teimum 26.846 eru nú talgildað meir enn 20.000 bond.

SavnsGull hevur nú eisini átikið sær at talgilda bondini í bandasavninum hjá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Hetta arbeiðið er væntandi liðugt í 2019.

Talgildingin av sjónvarpsbondum er nakað øðrvísi enn ljóðbóndini, tí tey eru í ymiskum formi. Nøkur bond verða talgildað her heima, meðan onnur verða send uttanlands. Bondini verða send til belgiska fyritøku at verða talgildað, tí útgerðin finst ikki í Føroyum, og er annars ring – og dýr – at fáa til vega. Umsókn varð send til "A.P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers fond til almene Formaal" í 2016, og grunnurin játtaði 5 milliónir kr. Tá varð sjónvarpsparturin eisini tryggjaður.

Eins og undanfarnu árini hevur SavnsGull kunnað um verkætlanina á Facebook og á kvf.fo. Tiltakið "Føroya søga talgildað" varð eisini tikið uppaftur, har Tjóðsavnið, Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið og Føroya Fróðskaparsetur vóru runt landið á miðnámsskúlum, har greitt varð frá, hvussu vit talgilda og varðveita okkara søgu og ikki minst, hvussu tey lesandi kunna fáa ágóðan av hesum arbeiði.

Samanumtikið má sigast, at tað gongur væl at bjarga tilfarinum. Nógv er longu bjargað og talgildað, og skrásetingin er væl á veg. Hugsað verður um, at góðskan er so góð sum gjørligt, soleiðis at savnið framvegis verður varðveitt so væl, sum til ber, og at tað kemur øllum føroyingum til gagns framyvir.

Tað ber til at lesa Ársfrágreiðingina hjá SavnsGulli fyri 2018 í heilum líki á kvf.fo/savnsgull



# Eitt ár við øðrvísi tiltøkum

*Í 2018 sendu vit bæði guðstænastu við forkunnugari vitjan frá krúnprinsafamiljuni, og sera væl umtókta nýggjárskonsert, har Hamradun og Lív Næs og Tróndur Enni framførdu løg, sum eru farin víða um á alnótini.*

## ÚTVARPIÐ

**HHES – HETTA HEILAGA EVANGELIIÐ SKRIVAR**
Hendan sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl. 17.45 og endursend sunnumorgun kl. 8.45. Sendingin verður sostatt send 52 ferðir um árið umframt endursendingar. Tað eru ymiskir prestar, sum skriva til eitt kirkjuár í senn, og í ár er tað Derhard Jógvansson, prestur, sum skrivar og lesur. Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent.
Sendingin hevur fingið nýtt eyðkennislag.

**MORGUNLESTUR**
Morgunlesturin verður sendur 6 dagar um vikuna alt árið – altso vóru 312 morgunlestrar lisnir í 2018. Ymiskir prestar hava skrivað morgunlestur, og teir og leikfólk hava lisið.

Á páskum hevði Anne Mette Greve Klemensen, prestur, liturgiskar morgunlestrar. Leif Hansen skipaði fyri sálmasanginum, og hesar sálmaupptøkur hava vit nú í savninum at brúka.

**SÁLMAR**
Vit hava í fleiri ár ferðast kring landið og tikið upp sálmasang, tí okkum vantar nýggjar upptøkur. Eisini er sálmabókaískoytið komið, og har eru fleiri sálmar, sum vit enn ikki hava í savninum.

Tá vit senda gudstænastur frá stórum kirkjum, tá hátíðir eru, taka vit sálmarnar serstakt upp, so teir kunnu fara í savnið.

30. august 2018 byrjaðu Mentanardagarnir í Fuglafirði við einum sálmamaratoni. Anne Mette Greve Klemsen, prestur, tók stig til hetta. Tiltakið var væleydnað, og vit fingu fleiri sálmar til høldar.

**FERÐALIÐIÐ**
Ferðaliðið er toymið, sum tekur møti og guðstænastur upp hvønn sunnudag, sum verður sent í sjónvarpinum kl. 16. Leingi hevur verið ynskt, at toymið fekk meira frálæru og annan upptøkubil. Í 2018 varð skipað fyri tveimum slíkum frálærudøgum, har tøkningar hjá KVF lærdu frá sær. Annar dagurin var í Kringvarpinum og hin í Hoyvíkar kirkju. Hendan kirkjan varð vald, tí hon er torfør at "ljósseta".

Ætlanin er at hava slíkar frálærudagar á hvørjum ári.

Eisini hevur Ferðaliðið lært at brúka OB-bilin, sum hevur nýggja tøkni og útgerð og tekur upp í HD. Hendan tøkniliga uppstiganin hevur við sær, at tað nú ber til at seta sálm, sálmanummar og nøvn á kirkjutænarum á skíggjan. Eftir er at fáa allar sálmar og tekstir, sum verða lisnir á skíggjan, meðan gudstænastan/møtið gongur.

**MØTI Í ÚTVARPINUM**
Seks ferðir um árið senda vit evangeliskt møti hjá Brøðrasamkomuni. Vanliga verða tey send sunnudag kl. 17.00. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

Í heyst útvarpaðu vit Samfelagsmøtið hjá Brøðrasamkomuni á Nabb.

**GUÐSTÆNASTUR Í ÚTVARPINUM**
Vit royna at senda guðstænastur kring alt landið, har tað ber til.

Annan hvítusunnudag sendu vit uttandura-guðstænastu av Ovara Vølli í Havn, og eisini hava vit sent dansibandsguðstænastu úr Vági. Tann 26. august sendu vit beinleiðis guðstænastu úr Sandavágs kirkju í útvarpinum, tá krúnprinsafamiljan var á vitjan, og Alla halganna kvøld sendu vit beinleiðis guðstænastu úr Dómkirkjuni.

**CREDO**
Credo verður sent hvønn sunnudag kl. 10.10. Í Credo verður ljós varpað á lív og menniskju, teg og meg, etikk, filosofi og moral, kirkjur og samkomur, átrúnað her og úti, og prát við menniskju. Persónliga søgan hjá einstaka føroyinginum hevur stóran lurtaraskara.

## SJÓNVARPIÐ

### GUÐSTÆNASTUR

Nýggjársaftan og nýggjársdag sendu vit nýggjárs-guðstænastu, sum varð tikin upp í Tvøroyrar kirkju 10. november 2018. Jónsvein Bech, prestur, prædikaði. Hamradun sang og spældi, og er henda framførsla farin víða um. Teir sungu sálmin ”Tað er ein stutt og stokkut løta”. Somuleiðis við sanginum og spælinum hjá Lív Næs og Tróndi Enni, sum sungu “Lítli fuglur”.



Vit hava sent:

- Felagskirkjuliga guðstænastu, sum í ár var í Adventistakirkjuni
- Uttanduraguðstænastu annan hvítusunnudag í Fuglafirði
- Guðstænastu í Gjónni við Gjógv
- Tá krúnprinsafamiljan var til guðstænastu í Sandavágs kirkju, sendu vit beinleiðis í sjónvarpinum.




Guðstænastur og møti annars verða send ymsastaðni frá í landinum. Tá søkur og stevnur eru, royna vit at senda guðstænastur higani. Møtini og guðstænastur annars eru úr Katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuligu Heimamissiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum og Heimamissiónini.



### ANDAKTIR Í SJÓNVARPINUM

Andakt er hvørt sunnukvøld kl. 19.50. Andaktir verða einans fluttar av serligum ávum. Tað eru ymsar samkomur og kirkjur, sum skriva og lesa hesar andaktir.

Á mishalgidøgum/hátíðum eru tað prestar í Fólkakirkjuni, sum skriva og lesa, og hesar andaktir verða tiknar upp í ymsum kirkjum.



# Barnaútvarpið

**MÁLMENNING**
Á barnaøkinum hevur Kringvarpið altíð hugsað málmenning, serstakliga seinastu árini, tá ið talgildu miðlarnir seta dagsskránna í barnauppalingini. Og tá ið Mentamálaráðið kunngjørdi í tíðindasendingini nýggjársdag 2018, at árið skuldi vera árið fyri málmenning fyri børn, tóku vit setningin í størsta álvara. Í barnaútvarpinum løgdu vit fyri at senda evnisvikuna 'Børn og mál', har ljós varð varpað á mál, samleika og hvønn týdning málið hevur. Síðan varð útvarpsleikurin 'Søgan um Sigmund' sendur, soleiðis at lurtarin varð undirhildin og lærdi um føroyingasøgu samstundis.

**FERÐAST KRING LANDIÐ**
Á hvørjum ári leggja vit okkum eftir at ferðast kring landið at hoyra søgur frá børnum og hoyra, hvat tey takast við. Úr rúgvuni kann nevnast, at vit vóru í Suðuroy og hoyrdu eittnú um positiva sálarfrøði. Eisini vóru vit vesturi í Vágum og hoyrdu um Eyðanstovuskipið og Beintu, vit vóru í Hvalvík og hoyrdu um Heimsmálini og um eplaveltu. Eisini fingið vit fleiri brøv til sendingina 'Lova mær við', har vit hoyrdu um kappróður, heimspartar, smáttur, um summarskúlan í Dali og mangt annað.

**EVNISVIKUR**
Vit leggja stóran dent á at gera evnisvikur, sum føroyingar kunnu kenna seg aftur í. Vit hoyrdu um fisk, sum er okkara høvuðsvinna. Á ein stuttligan og viðkomandi hátt lærdu vit um rognkelsi og um toskin. Eisini sendu vit evnisviku um seyð – um djóraslagið, kjøtið, ullina og vit hoyrdu nógvar stuttligar søgur um djórið, sum Føroyar eru uppkallaðar eftir.

Í 2017 og fyrst í 2018 varð ein lesikanning gjørd av lesivanum hjá børnum. Hesa kanningina vildu vit hoyra meira um, og tí settu vit eina lesiviku á skrá í barnaútvarpinum, sum tað fyrsta eftir summarsteðgin. Vit ynsktu at hoyra, hvat børnini høvdu at siga og hoyra frá teimum, sum høvdu gjørt kanningina, frá Bókadeildini, frá teimum, sum skriva, og øðrum, sum arbeiða við lesing.

Vælkenda spælið Fortnite hevur sett dagsskránna í skúlanum og í frítíðini seinastu tíðina. Hvat er so spennandi, stuttligt og dragandi við spælinum? Hetta fóru vit at kanna og funnu útav, at spælið er sera væl gjørt grafiskt, og at tú lættliga kanst brúka nógvar pengar, og at tú gloymir tíð og stað. Hóast telduspælið hevur 12 ára aldursmark, so kendu børn heilt niður í barnagarðsaldur til Fortnite. Sálarfrøðingur, foreldur, serfrøðingur og børn søgdu sína hugsan.



**SPENNANDI SØGUR OG FØROYSKAR FRAMLEIÐSLUR**
Í barnaútvarpinum borðreiða vit við fjølbroyttari fiktión. Vit hava sent 'Tey í Mórugøtu', 'Gladiatordrongin', 'Miljuløtur' og fleiri vælkenda søgur. Eittnú sendu vit bókina 'Træið' hjá Bárði Oskarssyni sama dag, sum hann vann stórfingr Norðurlendsku bókmentavirðislønina 2018 – tá vóru vit errin.

Søgan um sangin er ein afturvendandi táttur í barnaútvarpinum. Her verða søgur um vælkendar sangir fortaldar. Vit hoyrdu um 'Hákunardrongin', um 'Karina', um 'Stórhvalagildið' og um sangin 'Dukka mín er blá' og um spildurnýggju barnasangbókina.

Størsta framleiðslan á barnaøkinum í 2018 var jólakalendarin 'Flytifuglar'. Útvarpsleikurin er ein spennandi samtíðarsøga, sum gongur fyri seg í Vestmanna og á Válinum. 11 ára gamla Mai er høvuðspersónur. Hon er úr Thailandi og kom til Føroya til mammu sína at búgva, tá ið hon var seks ára gomul. Talan er um eina upprunaføroyska framleiðslu við nýskrivaðum tónleiki og sangum. Evnini í søguni vóru fjølbroytt, og fleiri viðkomandi spurningar vóru settir, eittnú: 'Hvat er heima?' 'Hvør eri eg í mun til hini?' Søgan skakaði okkum, og vit hoyrdu, hvussu orð kunnu særa, hvussu nógv tú kanst sakna ommu og abba í Tailandi, um at kenna seg øðrvísi, og um eitt barn, sum er horvið. Upptøkurnar vórðu gjørdar á Staðnum í Vestmanna, og børnini, sum vóru við, vóru vestmenningar. Barnaútvarpið hevði eitt sera gott samstarv við Nám til tess at farast kundi í dýpdina við ávísum evnum. Eittnú um kreppuna í 1992, um tíðina tá, um flytifuglar og at vera útlendingur í Føroyum. Her varð farið kreativt til verka, og hvønn gerandismorgun í desember vóru serstakar og fjølbroyttar uppgávur lagdar inn á Snar.fo, soleiðis at undirvísingartilfar lá klárt til læraran. Næmingar, serstakliga í miðdeildini, fingu dygdargott tilfar at arbeiða við í ymiskum lærugreinum.

# Barnasjónvarpið




## VINUS OG VIMÚS
Við ársbyrjan 2018 kom hugskotið til sjónvarpsrøðina 'Vinus og Vimús', har yvirskriftin var málmenning. Í sendingini hitta vit fitta vinin Vinus, sum dugir væl at finna uppá og siga frá. Inni hjá Vinusi er hugnaligt, veggirnir eru litfagrir, og hann eigur nógvar bamsur og nógv leiku at spæla við. Og góðar bøkur.

Í eini holu undir hillini býr Vimús. Vinus og Vimús eru vinir, hóast Vimús er ein mús. Alt, sum Vinus eigur og finnur uppá, tað eigur Vimús eisini, ella næstan sama slag.

Hvørja ferð finna Vinus og Vimús upp á okkurt nýtt at vísa øllum. Sumt er torført at gera, sumt er torført at finna, og sumt er nokkso torført at siga. Alla tíðina ber til at læra seg at siga øll orðini, hóast tey eru torfør. Ein sangur er við hvørja ferð, ein góður barnasangur til øll, sum tíma at lurta... eisini bamsurnar. Røðin 'Vinus og Vimús' er ætlað teim 3-6 ára gomlu. Virðisløntu 'Klangarnir' frá BBC sendu vit beint eftir 'Vinus og Vimús'.



## SUMA
Sendingin 'Suma' er nýggj sending, sum er ætlað teim størru børnunum. Sendingin snýr seg um børn í Føroyum í dag og teirra lívsumstøður. Í fimm sendingum verður hugt nærri at fimm ymiskum børnum og teirra gerandisdegi. Hvussu man tað vera at hava 8 systkin, at foreldrini eru farin hvør til sítt, at vera tvíburi, at hava spastisk bein ella at missa annað av foreldrunum? Sendingarnar vóru vælumtóktar, og RUV og YLE ynskja at vísa 'Suma'.




## MY LITTLE PONY VIÐ FØROYSKARI TALU
Endiliga fóru ponyrossini at tosa føroyskt. Tað vóru góð tíðindi hjá 'My Little Pony'-fjepparum, tá ið vit í september 2018 byrjaðu at senda teknirøðina. Nú tosa rossini føroyskt og syngja eisini á føroyskum.

## TÝSDAGUR ER DJÓRADAGUR
Týskvøld senda vit djórafilmar frá BBC, og í 2018 hava vit sent røðina 'Alt um djór' og røðina 'Dýralív'.

## HEIMASÍÐAN
Á heimasíðuni liggja sendingarnar, sum vit senda. Vit gjørdu tó eitt sindur meira burturúr, tá ið vit sendu jólakalendaran 'Flytifuglar' í desember. Tá høvdu vit samrøður, myndir og greinar.



# Röddin hjá teimum ungu

Röddin sá dagsins ljós í 2013. Röddin er tilboðið hjá Kringvarpi Føroya til tey ungu. Yvirskipaða ætlanin við Röddini er at fáa fatur á teimum ungu og venja tey at brúka miðlar og vera við til at skapa miðlaarbeiði.

Röddin er ein ungdómsredaktión, sum framleiðir tilfar til føroyskan ungdóm. Redaktiónin framleiðir alt frá greinum til podcast og videobrot, sum øll snúgva seg um evnir, sum onkursvegna hugtaka føroyska ungdómin. Röddin er skapt, verður rikin av, og er hjartabarnið hjá einum stórum netverki av ungum eldsálum. Felags fyri hesi er hugsjónin um, at eitt talgilt forum er alneyðugt fyri føroyskan ungdóm.

Málini hjá Röddini eru:

— at veita dygdargott tilfar um tónleik, list, ítrótt, politikk, samfelag, móta og átrúnað
— at skapa eitt samvirkið forum, har tú sleppur at siga tína hugsan og verða upplýst/ur
— at samansjóða ungdómin og í høvuðsheitum fáa margfeldni, íblástur og vitan inn í gerandisdag teirra ungu






# KVF á sosialu miðlunum

Vit fingu sendandi viðmerkingar frá 276 fólkum í 2018 til okkara almennu Facebook-síðu hjá Kringvarpinum, facebook.com/kringvarp

Í høvuðsheitum var hetta:
- Viðmerkingar til og um sendingar hjá KVF
- Tekniskar trupulleikar á okkara miðlapallum; netvarp, útvarp og sjónvarp
- Raðfestingar og spurningar til og um skrásetingina
- Tíðindaflutningin

Annars er vert at geva gætur, at flestu sendingar hjá KVF hava sínar egnu Facebook-síður, so samlaða talið av viðmerkingum fyri 2018 er væl hægri enn viðmerkingarnar frá teimum 276 fólkunum, og evnini, fólk spyrja um, eru meira víðfevnd enn nevnt omanfyri.

Sosialu miðlarnir eru ein týðandi partur av virksemi Kringvarpsins. Ein stórur partur av beinleiðis samskiftinum við brúkaran er á sosialu miðlunum, í privatum boðum og í almennum viðmerkingum. Almenni Facebook-vangin hjá Kringvarpinum er ofta tað fyrsta staðið, brúkarin leitar eftir sendingum, innsløgum og øðrum upplýsingum um Kringvarpið.

Kringvarpið brúkar sosialar miðlar til at hitta lesarar, lurtarar og hyggjarar, har teir eru. Kringvarpið brúkar sosialu miðlarnar til at veita upplýsing um tilfar okkara. Tað veri seg brellbitar, tíðindi, skrábroytingar, kunning o.a. Men stundum framleiðir Kringvarpið eisini innihald til brúkaran beinleiðis á Facebook. T.d. filma vit javnan tónleikaframførslur o.a. í útvarpssendingum og senda tað á Facebook ella Instagram.

Fleiri sendingar Kringvarpsins hava sín egna samleika á sosialu miðlunum. Eittnú Góðan Morgun Føroyar, Also og Leitisstein, bert fyri at nevna nakrar.

Visiónin er enn sum áður at vera slóðbrótarin í føroyska miðlalandslagnum og samstundis varðveita eitt gott, tætt samskifti við føroyingin, har hann er.

# Lyklatøl fyri heimasíðuna

- Tilsamans 23 milliónir síður vístar í 2018
- 1,52 millónir vitjanir um Facebook (fólk hava klikt á tilfar, sum er deilt)
- 1,5 milliónir klikk á beinleiðis útvarp
- 1 millión klikk á beinleiðis sjónvarp
- 3.000 føroyingar lesa andlát hvønn dag
- Flestu fólk, sum vitjaðu kvf.fo í 2018, vóru í:
    - Føroyum: 65,11%
    - Danmark: 16,64%
    - Norra: 3,43%
- 72,9% av vitjanunum á heimasíðuni vóru um fartelefon ella teldil

# Tónleikur í Kringvarpi Føroya

**ANNAÐHVØRT LAG VAR FØROYSKT**
2018 var eitt ríkt og spennandi tónleikaár, og fyri fyrstu ferð kunnu vit nøktandi siga, at helvtin av spælda tónleikinum í útvarpinum var føroyskur. Tónleikasendingarnar í útvarpinum fevndu breitt:

- **Mono** – nýggjar og sera ymiskar sendirøðir, oftast í fimm pørtum, við skiftandi vertum
- **Afturljóð** – popminnir frá 50-, 60- og 70unum
- **Áðrenn Elvis** – upprunatónleikur frá tíðini fyri Elvis og rock'n'roll
- **Bolero** – klassiskur tónleikur við skiftandi vertum
- **Jazzofonin** – jazztónleikur við skiftandi vertum
- **Gospeltónar** – kristin tónleikur
- **Klassiskt sunnukvøld** – klassiskur tónleikur við verti
- **Kvørnin** – ummæli av føroyskum heildarútgávum og stakløgum í beinleiðis sending
- **Norðurljóð** – nýggjur norðurlendskur tónleikur
- **Plátubarrin** – beinleiðis leygarkvøldssending við verti, temaplátu og lurtaraynskjum
- **Temaplátan** – skiftandi útgávur verða viðgjørdar
- **Síðsta skríggj** – um nýggjar altjóða heildarútgávur
- **Tit skriva, vit spæla** – sending við lurtaraynskjum og SMS-heilsanum
- **Upp á gólv** – føroysk kvæði
- **Upp á tá** – norðurlendskur og føroyskur dansibandstónleikur
- **Døgurðabitin** – blandaður tónleikur við skiftandi vertum
- **Leitisstein** – blandaður tónleikur

Umframt tær vikuligu sendingarnar vóru eisini aðrar stakar tónleikasendingar í sambandi við høgtíðir og merkisdagar.

Spæl føroyskt-vika var frá 7. til og við 13. mars, og tá varð einans føroyskur tónleikur spældur í øllum frumsendingum, í náttarrásini og millum sendingar í útvarpinum annars.

Faroese Music Awards 2018 var í Norðurlandahúsinum tann 10. mars, og KVF framleiddi og varpaði tiltakið beinleiðis í útvarpinum og í sjónvarpinum.





















**TÓNLEIKARÁÐIÐ**
Tónleikaráðið er samansett av starvsfólkum í KVF, sum fáast við ella spæla nýggjan tónleik í útvarpinum. Í 2018 vóru limirnir Ragnar A. Jacobsen, Høgni Fagraberg, Elin Michelsen, Rúni Jákupsson, Rannva Gaard Fossaberg, Uni Leitistein Hansen, Heiðrún Hödd Guðmundsdóttir og Eyðfinn Jensen.

Tónleikaráðið fremur innanhýsis vitanardeiling um nýggjan tónleik og avger eftir demokratiskari skipan, hvørjir nýggir sangir verða settir í umferð undir leiðslu av tónleikasamskiparanum, Eyðfinni Jensen.

Á vikuligum fundum verður nýggjur tónleikur spældur, viðgjørdur og vigaður, áðrenn hann verður settur í umferð. Uppskotini koma frá føroyskum tónleikarum, lurtarum hjá útvarpinum og frá limunum sjálvum.

Eitt nýtt samstarv millum tónleikasamskiparan, skrádeildina og sendirúmið hjá sjónvarpinum byrjaði í 2018. Endamálið er at útvega og senda nýggj føroysk videoløg. Í fyrstu syftu er talan um millumsendingar, men ætlanin er at menna konseptið í 2019 til eisini at fevna um styttri og longri blokkar, sum skulu sendast áðrenn og aftan á vanligu sjónvarpsskránna.

**FLEIRI KONSERTSUPPTØKUR VÓRÐU SENDAR Í SJÓNVARPINUM:**
- Nýggjárskonsertin 2018 við Føroya Symfoniorkestri
- Fagnaðarkonsert við Føroya Symfoniorkestri
- Faroese Music Awards 2018
- Teitur – I Want To Be Kind, útgávukonsert í 2018
- Hamferð – Evst, útgávukonsert í 2018
- Konni Kass – Haphe, útgávukonsert í 2018
- Kristina Bærendsen – konsert á Summarfestivalinum
- Sálmar í nýggjum hami
- Bach í Kirkjubø
- Kontry jól við Magna Christiansen
- Jólaklokkan aftur ringir, sangløta úr Rituvíkar kirkju
- Jól við Løkin 2017
- Jól við Løkin 2018

# Public service-skyldur hjá Kringvarpi Føroya

*Tað er lógarásett, at Kringvarpið eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum og hevur skyldu at tryggja starvsfólkinum holla málsliga ráðgeving." verður sagt í public service-sáttmálanum*

**FØROYSKT MÁL Í KRINGVARPI FØROYA**
Kringvarpið er tilvitað um ábyrgdina og týdningin, ið stovnurin hevur fyri føroyska málið. Stremban okkara er, at allar sendingar, ið Kringvarpið framleiðir, eru á góðum føroyskum máli. Fyri at lúka hesar ásetingar kann nevnast, at vit hava regluligt samband við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum og fáa eftir tørvi vegleiðing um málsligar spurningar. Umframt hetta hevur Góðan Morgun Føroyar ein regluligan máltátt, har málserfrøðingur greiðir frá, og lurtararnir hava høvi at seta spurningar. Harumframt veitir KVF, gjøgnum nýggjan intranetplattform, eisini starvsfólkunum málsliga ráðgeving.

**TÝTT ÚTLENDSKT TILFAR**
Av tí at fíggjarlig orka ikki hevur verið til at týða alt útlendskt tilfar til føroyskt og orsakað av rættindaspurningum, hevur Kringvarpið lagt seg eftir at týða so nógv barnatilfar sum gjørligt. Tað er umráðandi, at føroysk børn hava atgongd til útlendskar teknifilmar, sum eru týddir til móðurmálið, eittnú "My Little Pony" og "Alt um djór".




Kringvarpið hevur eisini týtt sendingar til vaksin, tó hevur tað í størstan mun verið talan um føroyskan tekst og ikki føroyska talu.

**TÆNASTUR TIL FÓLK, IÐ BERA BREK**
Tíðindasendingin Dagur og Vika varð deyvatulkað í 2018. Játtanin til deyvatulking er 585.000 krónur. Eisini verður dokumentarurin hóskvøld tekstaður.



**SENDINGAR ÚTI UM LANDIÐ**
Við Tórði á túri er vikulig sending, sum vitjar øll økini í landinum og greiðir frá gerandisdegnum á bygd og í býi. Harafturat eru nógvar av sendingunum hjá Kringvarpinum regluliga kring landið. Eittnú kunnu vit nevna útvarps- og sjónvarpstíðindini, Góðan Morgun Føroyar og seinnapartssendingina Nón, sum hevur út útvarpað frá fleiri av mentanarvikunum í landinum. Kringvarp Føroya er fyri allar føroyingar, og tí er týdningarmikið, at stovnurin javnan framleiðir tilfar úr øllum landinum.

**KEYPTAR FRAMLEIÐSLUR**
Fríyrkisfólk hava staðið fyri meginpartinum av framleiðsluni av vanligu ítróttarsendingunum. Til ítróttarsendingina 3-2 hevur Kringvarpið brúkt fríyrkismyndafólk og fríyrkisprogrammfólk til hvørja sending. Kringvarpið hevur havt góðar royndir av hesi loysn. Guðstænastur og møtir á



*Kringvarp Føroya er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins*

sjónvarpsskránni hava verið framleidd av fríyrkisfólki gjøgnum drúgt áramál. Morgunlestrar og Hetta Heilaga Evangeliið Skrivar í útvarpinum verða framleidd av fríyrkisfólki, eins og fríyrkisfólk standa fyri stórum parti av tónleikasendingunum í útvarpinum. Deyvatulkingin av Degi og Viku verður gjørd uttan fyri húsið. Eisini verða fríyrkisfólk brúkt í sambandi við framleiðslu av sjónvarpssendingum, eittnú sendirøðin Has#tag hjá Mariu Winther Olsen. Útvarpssendingin Pressan verður somuleiðis framleidd av fríyrkisfólki. Kringvarpið hevur samanumtikið góðar royndir við at keypa tænastur frá fríyrkisfólki til programmframleiðslu.

**FØRLEIKAMENNING OG DYGD**

Kringvarpið hevur hildið fram við arbeiðinum at førleikamenna starvsfólkini innan fyrisiting, tøkni og journalistikk. Starvsfólk fáa møguleika at koma regluliga á skeið, sum eru viðkomandi fyri teirra arbeiðsøki. Fyri at tryggja dygdina í framleiðslunum hjá Kringvarpinum, verða eftirmetingar javnan gjørdar við uttanhýsis fólki. Í árligu menningarsamrøðunum, sum øll starvsfólk taka lut í, verður menning hjá starvsfólkinum umrødd og viðgjørd. Endamálið við hesum samrøðum er, at einstaka starvsfólkið skal fáa høvi at ávirka arbeiðsmenningina ein veg, sum bæði sampakkar við áhugan hjá starvsfólkinum og gagnar Kringvarpinum.

**PARTUR AV TILBÚGVINGINI**

Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnumrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har tørvur er á tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið eftir eina lítla løtu kann varpa út, um eitthvørt álvarsamt hendir. Kringvarpið hevur nakrar ferðir sent tilbúgvingarútvarp í sambandi við ódnarveður. Sent verður út á kvøldarnar og náttina við, so at fólk kunnu fara til songar við seinastu upplýsingunum um illveður.

**UNDIRVÍSING**

Kringvarp Føroya og Nám samstarva um at útvega tilfar til skúlar. Arbeitt verður støðugt við at gera allar sendingar tøkar, soleiðis at undirvísingarstovnar lætt og skjótt kunnu fáa atgongd til tilfarið, sum Kringvarpið framleiðir. Seinasta dømið er útvarpsjólakalendarin Flytifuglar, har næmingar á miðdeildini fingu dygdargott undirvísingartilfar við støði í sendirøðini. Kringvarpsfólk vitja av og á skúlar, har greitt verður frá um public service, journalistikk og etikk.

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya — Postsmoga 1299 — Norðari Ringvegur 20 — 100 Tórshavn